# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 15. desember 2009




Leygardagin vann Neistin oddadystin móti StÍF. Nú skulu liðini aftur hittast í fjórðingsfinalu í steypakappingini

# Fjórðingsfinalur hjá monnum í morgin

**Teir fýra hálvfinalistarnir í steypakappingini í manshondbólti verða funnir í annaðkvøld**




Jákup Mørk

Sambært heimasíðuni hjá HSF skulu hálvfinalurnar spælast mikukvøldið, og talan kann her væl gerast um tættar uppgerðir.

Soleiðis spæla tey bæði oddaliðini í Atlantic Airways-kappingini, Neistin og StÍF, ímóti hvørjum øðrum. Tað gjørdu tey eisini leygardagin, tá Neistin vann tryggan sigur, men strandingar eru meira enn nakað steypaliðið í føroyskum manshondbólti, og tí vita teir í Neistanum, at teir skulu ansa sær.

Eisini spæla Kyndil og KÍF. Her hevur Kyndil havt takið á kollfirðingum í vetur, men í báðum dystunum, sum hava verið millum liðini, hevur sigurin verið sera tepur.

Í hinum báðum dystunum er talan um lið er bestu deildini móti liði úr næstbestu deildini. H71 spælir á útivølli móti næstbestu vestmenningunum, og besta liðið hjá VÍF spælir heima móti Team Klaksvík.

# Vágamaður til AB

**Gunnar Haraldsen, sum í ár var fastur fúsur í verjuni hjá 07 Vestur, verður komandi ár at síggja í AB-búnanum**




Jákup Mørk

Tað skrivar AB á heimasíðu sínari.

- Eg havi nú spælt í Vágum í fleiri ár, og vildi tí gjarna koma aftur til Havnar at spæla. Tá so møguleikin var at koma á liðið hjá AB, tók eg av. AB gjørdi tað gott í fjør, og tað skuldi verið møguleiki fyri at klára tað enn betur næsta ár. AB er eitt hart kempandi lið, og tað passar mær væl, sigur Gunnar Haraldsen við heimasíðuna hjá AB.

Sjúrður Olsen, næstformaður í FC Argjum, og venjarin, Allan Mørkøre, fegnast á heimasíuðni um, at Gunnar verður í hópinum komandi kappingarár.

- Gunnar kann spæla á fleiri plássum, og hann hevur royndir frá bestu deildini. Tað hevur nógv at siga, siga teir báðir við heimasíðuna.




Gunnar Haraldsen verður boðin vælkomin av Sjúrði Olsen, næstformanni í FC Argir

Mynd: www.ab.fo



## Kappaðust í inniróðri

Triðja umfar í RK Prix í inniróðri, sum Róðrarfelagið Knørrur skipar fyri, varð hildið sunnudagin. Hjá yngstu rógvarunum, ið eru undir 15, vunnu Anna Louisa Rubek Nielsen og Jósef Zachariassen. Fyri U18 vunnu Gunnvá Fossaberg Ellingsgaard og Brestir Mikkelsen, meðan Johanna Petersen og Kári Rubek Nielsen vunnu kappingarnar fyri vaksin. Næsta umfar av Grand Prix-kappingini í inniróðri verður 24. januar.

## Claus vil sleppa heim

Síðani hann tíðliga í heyst gavst í Fleetwood, hevur fyrrverandi føroyski landsliðsspælarin, Claus Bech Jørgensen, roynt at finna sær nýtt felag. Nú sigur spælarin við Horsens Folkeblad, at hann mest av øllum kundi hugsað sær at spælt í donsku superliguni. – Men tað er trupult, hóast eg eri free-transfer. Eg spældi í 32 dystum í næstbestu ensku deildini seinasta kappingarár, og tí haldi eg, at eg havi nakað at geva frá mær, sigur Claus Bech Jørgensen við Horsens Folkeblad. Bold.dk skriva tó, at tað er mest sannlíkt, at navnið á nýggja arbeiðsgevaranum verður Cheltenham.